# Heimsins mest framkomna boriskip skal finna føroysku oljuna




*Stena Carron verður skjótt at síggja á siglingarleiðunum millum Føroyar og Hetland. Tað fer undir at bora brunnar komandi trý ár bert einar 13 til 23 kilometrar frá markinum. Kelda Chevron*

**Í næstu framtíð kemur heimsins mest framkoma og best útgjørda boriskip á leiðina millum Hetland og Føroyar. Talan er um Stena Carron, sum er bygt í Suðurkorea og sum komandi árini skal bora tíggjutals brunnar á Atlantsmótinum, her m.a. helst eisini á føroyska landgrunninum**

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er amerikanska oljufelagið Chevron, sum er stigtakari til eina risastóra boriverkætlan á Atlantsmótinum komandi árini. Chevron boðaði longu fyri nøkrum árum síðani frá, at tað fór undir at útvega eitt spildurnýtt boriskip til at leita eftir nýggjum olju- og gasskeldum og til at gera nýggj fund klár til framleiðslu. Fyri at kunna røkka einum slíkum stórum máli er neyðugt at hava tøku leitiorkuni og nú verður hon so tøk. Nú verður seinasta hond løgd á at gera heimsins mest framkomna oljuboriskip klárt til at fara undir at bora brunnar millum Hetland og Føroyar.

Í fyrstu syftu skal Stena Carron bora ein avmarkingar- metingarbrunn á Cambo leiðini í bretskum øki tætt upp at føroyska markinum. Tað er Amerada Hess, sum er fyristøðufelag, meðan Chevron, Dong og OMV eru partnarar. Hetta verður tíðliga í heyst, helst í september.

Eftir tað fer Stena Carron so fyri loyvishavararnar í teigi 213, Chevron, StatoilHydro, Dong og OMV undir eina risastóra boriverkætlan komandi trý árini, sum fevnir um at bora bæði avmarkingar- og metingarbrunnar og leitibrunnar á Rosebank/Lochnagar leiðini, nakað longur norðuri og tætt upp at føroyska markinum. Hetta økið, har Chevron í 2004 rakti við stórar goymslur við olju og gassi í sjálvum basaltløgunum, verður nú kallað "Greater Rosebank Area", og líkt er til, at vit fara at hoyra nógv meira til hetta spennandi økið næstu árini. Økið er ikki minst áhugavert fyri Føroyar, tí tað liggur bert 13 kilometrar